


www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 10 - 2012

# ENI funnið gass í Barentshavinum

Nú alt meira fokus er á Barentshavið kunnger italska oljufelagið ENI, at tað hevur rakt við gass 50 kilometrar norðan fyri Snøvit gasskelduna hjá Statoil. Tað er eitt sindur óvist, um keldan er rakstrarverdug. Hini feløgini, sum eru við í Salina fundinum eru Lundin, Det Norske og RWE Dea. ENI brúkti boripallin Scarabeo 8 til brunnin. Hesin er nú farin at bora brunnar á Goliat kelduni, sum ENI fann fyri nøkrum árum síðani og sum nú verður bygd út sum fyrsta oljuframleiðandi keldan í Barentshavinum. Eisini føroysk áhugamál eru í leitingini í Barentshavinum, har Faroe Petroleum er við í leitiloyvum.